# Útisetarnir spenna seg út




John Eystberg er ein av spælarunum á føroyska útisetaliðnum

*Mynd: Bárður Eklund*

**ÍF Føroyar hevur ongantíð verið so væl fyri, nú eitt nýtt kappingarár stendur fyri durum hjá útisetafelagnum í Keypmannahavn**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

– Málið hjá besta liði felagsins er uppflyting úr seriu 1 til Keypmannahavnarseriuna. Vit hava nógvar góðar leikarar, og tí halda vit, at tað eigur at bera til við enn einari uppflyting, heldur virkandi formaðurin í ÍF Føroyum, Uni Leitisstein Hansen.

Seinastu árini hevur ÍF Føroyar, sum er felagið hjá føroyingum í Keypmannahavn, støðugt tikið seg fram. Fyrsta lið flutti upp næstseinasta kappingarár, og annað lið flutti upp í fjør. Eingin ivi er millum leikararnar, at málið fyri komandi kappingarár er at vinna felagnum enn eina uppflyting. Fyrsta lið spælir í løtuni í seriu 1, meðan annað lið fyri fyrstu ferð skal spæla í seriu 2.

– Breiddin í leikarahópinum hevur ongantíð verið so góð sum beint nú. Vit hava havt eini 35 leikarar í miðal til hvørja venjing, og tað hava vit ikki upplivað fyrr so tíðliga á árinum, sigur formaðurin.

## Økt virksemi

ÍF Føroyar er blivið eitt meira dynamiskt og livandi felag seinastu árini, men hvør er orsøkin til tess?

– Vit hava roynt at fingið nevndararbeiðið og samskipanina av felagnum at koyra betur seinastu árini. Talið av nevndarlimum er økt, og fleiri leikarar eru tilreiðar at átaka sær uppgávur í felagnum, sigur Uni.

Felagið hevur tískil verið rikið meira seriøst seinastu árini, og tað hevur givið úrslit, um hugt verður eftir talinum av leikarum, sum eru aktivir. Eisini sæst hetta aftur í úrslitum felagsins, sum hevur tryggjað sær uppflyting við tveimum teimum bestu liðunum tvey fylgjandi kappingarár.

Hetta hevur havt við sær, at føroyingar nú hava meira lyndi til at uppsøkja felagið, tí tað er blivið eitt seriøst alternativ til onnur donsk feløg.

Hann leggur afturat, at Hegga Samuelsen, sum var leikandi venjari inntil síðsta summar, gjørdi eitt sera stórt arbeiði at fáa føroyskar leikarar, ið spældu aðrastaðni í høvuðsstaðarøkinum, at koma til ÍF Føroyar at leika ístaðin. Hetta hækkaði beinanvegin støðið munandi og var við til at lyfta felagið uppá tann aldukambin, sum tað ríður á í løtuni. Hegga er tó fluttur aftur til Føroyar, og nú er tað danin Bruno Simonsen, ið hevur ábyrgdina av besta liðnum.

Samstundis sum felagið hevur havt viðvind, eru útreiðslurnar í sambandi við raksturin av felagnum øktar nakað.

– Vit hava fingið góðan fíggjarligan stuðul úr Føroyum, og tað hevur millum annað gjørt tað møguligt hjá okkum at seta tveir venjarar til hetta kappingarárið, sigur Uni L. Hansen, sum leggur afturat, at felagið má ansa eftir ikki at spenna bogan ov høgt.

Tað er nevniliga eitt mark fyri, hvussu høgt felagið kann røkka, og tí ræður um at seta sær mál, sum allir leikararnir kunnu taka undir við.

Felagið hevur sostatt miðvíst arbeitt fram ímóti at gerast eitt ítróttarliga attraktivt tilboð hjá leikarum, sum leita til Keypmannahavnar í lestrar- og arbeiðsørindum. Tann yvirskipaði málsetningurin hjá felagnum er at skapa avbjóðingar og trivnað fyri føroyskar leikarar, og tað hevur sum heild eydnast væl.

Formaðurin heldur, at hugburðurin í felagnum mangan hevur verið, at tað ikki skal gerast ov seriøst, tí at so missa leikararnir skjótt áhugan fyri at spæla. Hetta hevur tó víst seg ikki at halda. Hinvegin hevur tað víst seg, at jú størri arbeiði hevur verið lagt í felagið, tess størri áhuga hava leikarar víst felagnum.

## Levera til Føroyar

Frágongdin úr felagnum í ár vísir, at ÍF Føroyar ger føroyskum feløgum eina stóra tænastu við at halda leikarar virknar.

B68 hevur tryggjað sær tveir fyrrverandi leikarar hjá ÍF Føroyum. Teir eru Herbert í Lon Jacobsen og Mikkjal Thomassen. Teir hava verið týðandi leikarar seinastu kappingarárini, og nú eru teir aftur tilreiðar at tørna til í føroysku landskappingini. Aðrir leikarar, ið væntandi verða at síggja í føroysku 1. deild, og sum eisini hava leikt við ÍF Føroyum, eru Niclas Niclassen (KÍ) og Kári Sigvardsen (NSÍ).

Eisini kunnu nevnast Hegga Samuelsen, sum nú er venjari í Fram, og Magni Mohr, ið er hjálparvenjari hjá B36.

Sum nú er venja leikararnir tvær ferðir um vikuna umframt at spæla ein dyst um vikuskiftið. Ráðiligt er ikki at venja oftari, tí at teir flestu leikararnir eru farnir undir hægri lesnað, sum tekur nógva tíð.

## Leikararnir eru felagið

– Leikararnir eru felagið, og felagið er leikararnir. Soleiðis lýsir formaðurin grundarlagið undir felagnum. Tað eru nevniliga bert aktivir leikarar, ið sita í nevndini, og sum taka sær av tí praktiska virkseminum kring felagið.

– Tann sosiala samveran hevur eisini stóran týdning og er í veruleikanum grundarlagið, sum felagið byggir á, og tað fær virksemið at ganga upp í eina hægri eind. Tað er merkisvert, at leikararnir standa saman um felagið, hóast teir koma úr hvørjum herðshorni í Føroyum, sigur formaðurin í ÍF Føroyum.

Tí er tað umráðandi at halda fast um tað sosiala grundarlagið, um felagnum skal vera lív lagað.

Tað var eisini við tí endamáli, at felagið varð stovnað í 1939, júst sum kríggið varð brostið á. Fleiri føroyingar vórðu við eitt avskornir frá heimlandinum og tóku seg tí saman at stovna eitt ítróttarfelag fyri føroyingar í Danmark.

Felagið spældi sín fyrsta skrásetta dyst í 1941 og heilt fram til 1994 varð spælt í DAI (Dansk Arbejder Idræt), tá felagið gjørdi av at lima seg inn í KBU (Københavns Boldspil Union), og síðani hevur tað gingið støðugt framá.

Danska kappingin fer av bakkastokki fyrst í apríl mánaði, og tá fæst at síggja, um fyrireikingarnar hava givið úrslit.

### Fakta

**um ÍF Føroyar:**

Stovnað í 1939 av føroyskum útisetum í Keyp mannahavn

Í fjør umboðaðu tilsamans 71 leikarar ÍF Føroyar. Árið fyri var talið 80

Venjari hjá 1. liði er Bruno Simonsen (dani)

Venjari hjá 2. liði er Frankie Jensen

Felagið hevur trý lið í landskappingini:
1. lið spælir í seriu 1
2. lið spælir í seriu 2
3. lið spælir í seriu 4

Heimasíðan: www.fotboltur.dk við frásagnum frá dystum og tíðindum um felagið






*Brasilski Santos tykist gerast ein sannur fongur hjá B36. Móti NSÍ var hann við í nógvum, og hann krýndi eisini avrikið við einum framúr vøkrum máli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Bólkur 1:

# B36 hevur tryggjað sær heimavøll

**KÍ skal í Gundadali spæla fyri at eiga heimavøll í fjórðingsfinaluni, og NSÍ hevur framvegis góðar vánir fyri at gerast partur av fjórðings-finaluni**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Í dupult umfarinum á páskum gekk tað umleið soleiðis, sum tað kundi roknast við. Við fullari úrtøku á heimavølli ímóti NSÍ og í Sandavági hevur B36 undan síðsta umfarinum tryggjað sær fremsta plássið í bólkinum. Harvið eiga teir heimavøll í fjórðingsfinaluni.

KÍ vann stórsigur á heimavølli ímóti FS Vágum. Og í Runavík tóktist tað leingi sum um, at teir skuldu fáa fult og harvið framvegis hava møguleika fyri bólkasigri, um teir í síðsta umfarinum komandi leygardag høvdu fingið fult í Gundadali ímóti B36.

NSÍ javnaði í síðstu løtu ímóti KÍ. Eina stigið ímóti KÍ verður týdningarmikið, tá ið tað leygardagin skal gerast upp. NSÍ er upplagdur favorittur at vinna á FS Vágum, og harvið fara teir ivaleyst at vera annar av tríarunum, sum fer at halda fram í kappingini.

## Bárður væl fyri

B36 var mesta partin av tíðini omaná ímóti NSÍ. Bárður Mortansson, sum higartil í ár hevur verið betri fyri enn nakrantíð áður, stútaði til 1–0 í fyrsta minutti. Brynjolvur Nielsen javnaði við frísparki úr heilt stórari fjarstøðu, og dygst eftir steðgin stútaði John Petersen til 2–1.

NSÍ royndi at koma afturíaftur, og teir vóru ikki so langt burtur. Burturúr ongum økti Ronnie Samuelsen til 3–1. Gestirnir í Gundadali vóru alt annað enn nøgdir. Teir mettu, at fríspark var gjørt ímóti Jens Martini Knudsen, men tí fingu teir ikki viðhald í. Alex økti til 4–1 við rimmar skoti av brotsteigarmarkinum. Sjúrður Jacobsen pyntaði um úr ellivu metrum, eftir at Jónstein Petersen, sum var við fyri fyrstu ferð í ár, varð feldur.

Á Valloyruni var nógvur vindur 2. páskadag. B36 skoraði trý mál síðstu løtuna undan steðginum og harvið varð tað. Aftur hesa ferð var Báðrur Mortansson eyðsýndur. Við beinleiðis frísparki setti hann hol á, og hann átti lut í uppspælinum til 2–0 málið, sum Ronnie Samuelsen stútaði. Ronnie økti til 3–0 eftir langt innkast frá Allani Mørkøre.

## KÍ á rættari kós

Í góðveðrinum Skírisdag frøddust klaksvíkingar um, at teirra skoraðu sjey mál, men teir ásannaðu samstundis, at tað bar ikki til at leggja nakað serligt í stórsigurin ímóti FS Vágum, sum hevði sera lítið at bjóða.

Erling Fles hevði nógvar møguleikar, og hann skoraði trý mál. Arnhold Joensen, sum skoraði til 2–0 eftir skjótt álop í vinstru og sending tvørturum, var væl upplagdur, og tað var liðformaðurin, Atli Danielsen, sum skoraði tvær ferðir, eisini. Unglingaspælarin Julian Samuelsen fekk tólv minuttir á vøllinum, og hann var púra leysur, tá ið hann skoraði.

Í Runavík var ferðin lutfalsliga stór. KÍ sýndi betri hugflog í álopsspælinum, og teir vóru betri skipaðir í verjupartinum, men teir fingu ikki stóra úrtøku. Jacob Bymar skoraði málið stutt eftir steðgin, tá ið hann kom ímillum afturlegging. NSÍ hevði trupulleikar á miðvøllinum, men teir megnaðu stutt undan leikloki at javna til 1–1. Eftir skjótálop og innlegg frá Helga L. Petersen stórbjargaði Jákup Mikkelsen til horna eftir fluktskot frá Óla Hansen. Hornasparkið varð longt til handara stólpan, har Kári Hansen setti høvdið undir bóltin.



*Við javnleikinum í evstu løtu tryggjaði NSÍ sær eitt gott útgangsstøðið undan seinasta umfarinum. KÍ hevur hinvegin vissað sær næst-fremsta sætið í bólkinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Skírisdag 8. apríl**
**B36–NSÍ 4–2 (1–1)**
1–0: Bárður Mortansson 1.
1–1: Brynjolvur Nielsen 11.
2–1: John Petersen 47.
3–1: Ronnie Samuelsen
4–1: Alex dos Santos 78.
4–2: Sjúrður Jacobsen br

**KÍ–FS Vágar 7–0 (2–0)**
**1–0: Erling Fles**
2–0: Arnhold Joensen
3–0: Erling Fles
4–0: Erling Fles
5–0: Atli Danielsen
6–0: Julian Samuelsen
7–0: Atli Danielsen

**2. páskadag 12. apríl**
**FS Vágar–B36 0–3 (0–3)**
0–1: Bárður Mortansson 35.
0–2: Ronnie Samuelsen 37.
0–3: Ronnie Samuelsen 42.

**NSÍ–KÍ 1–1 (0–0)**
0–1: Jacob Bymar
1–1: Kári Hansen

# 8 klárir til FM í billard

**Fyrrverandi føroyameistari hevði methøgt meðaltal – omanfyri 36 eygu – og er hann tí ein av favorittunum til FM-heitið í ár. Maðurin er Henrik Petersen. Verandi føroyameistari eitur Krisjan Suni Høgnesen**

BILLARD
*tíðindaskriv*

Tað er nú greitt, hvørjir 8 spælarar verða í í endaspurtinum í staklingakappingini í billard vikuskiftið 16 og 17. Apríl í Kagganum í Havn. Kappast var á borðunum í Havn síðsta vikuskiftið og komu hesir víðari: Henrik Petersen, Niels Nielsen, Carsten Hansen, Bjarni Skaalum, Anfinn Hjalmarsson, Jóhannes Skaarup og Ólavur Kjølbro. Aftrat hesum verður so eisini verandi fø.royameistari, Krisjan Sune Høgnesen við.

Tað óvanliga við inleiðandi umfarinum var, at allir tríggir spælararnir á 1. liði hjá Havnar Klubba og Kagganum komu víðari. Tað er greitt, at Krisjan Sune fer at fáa harða kapping í finaluni. Eftir ein steðg í nøkur ár er Henrik Petersen, sum hevur vunnið fleiri FM heiti áður, við aftur. Hann vísti eisini í kappingini leygardagin, at hann verður ein álvarssom hóttan, tá keylur skulu koppast um knappar 14 dagar. Meðaltal hansara var sera høgt og kanska eitt tað hægsta í billardkappingum her heima. Tá avtornaði varð meðaltalið hjá Henrikki góð 36 eygu.

Liðkappingin endaði eisini nú um dagarnar. Klaksvíkar Billardfelag gjørdist nr. 1 í bæði 1. og 2. deild.